# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Vit eiga als ikki at lova eftirlitsmonnum umborð á trolararnar*
*(russiskur trolaraskipari)*



# – Eg hevði gjørt tað aftur

**Fyri einum lítlum ári síðani stakk russiski trolarin ”Elektron” av við tveimum norskum eftirlitsmonnum umborð. Skiparin sigur, at hann hevði gjørt tað sama aftur.**

Valerij Jarantsev, skipari, var í gjár í rættinum í Murmansk, tí hann er ákærdur fyri at hava borið fiskiveiðisáttmálan millum Noreg og Russland. Í fyrra lagi er hann ákærdur fyri at hava fiskað ólógliga við Svalbard, og í øðrum lagi er hann ákærdur fyri at rýma undan norsku sjóverjuni við tveimum norskum eftirlitsmonnum umborð. Tann seinna ákæran er tann álvarssama, tí verður skiparin funnin sekur, kann hann fáa upp í fimm ára fongsul. Men tað órógvar hann ikki.

- Eftirlitsmenn eiga als ikki at sleppa umborð á trolararnar. Hevði eg ikki lovað teimum umborð, hevði eg ikki staðið her í dag. Men eg ivist ikki í, at eg hevði gjørt júst tað sama eina aðru ferð, segði tann 52 ára gamli skiparin í rættinum. Hann vildi eisini vera við, at hann hevði boðið norsku sjóverjuni at seta bát út, so teir kundu fáa eftirlitsmenninar aftur, men at sjóverjan tók ikki av. Hetta avsanna norðmenn.

### Fangar í fýra samdøgur

Tað var tann 15. oktober í fjør, at sjóverjuskipið ”Tromsø” setti tveir menn umborð á ”Elektron”, sum royndi við Svalbard. Kanningarnar vístu, at trolarin royndi við ov smáum meskum, og skiparin fekk boð um at sigla til Tromsø.

Russiski skiparin játtaði at gera eftir boðunum, men brádliga koyrdi hann fulla ferð á og setti kós ímóti russiskum sjógvi. Í fýra samdøgur sigldu fýra norsk sjóverjuskip aftan á trolaranum, og ikki fyrr enn trolarin var komin í russiskan sjógv, sluppu teir báðir norsku eftirlitsmenninir av skipinum.

Norsku myndugleikarnir ætlaðu at leggja sak ímóti skiparanum og reiðarínum, men russiska ákæruvaldið valdi at stevna skiparanum. Rættarmálið í Murmansk byrjaði í gjár.

# Leita eftir eftirmanni til Kofi Annan

Fleiri eru til reiðar at taka við starvinum sum aðalskrivari í ST, men tað kann taka drúgva tíð at finna tann rætta.

Á skrivstovunum á ST-høvuðsborgini í New York verður dúgliga tutlað um, hvør skal taka við sum aðalskrivari á nýggjárinum, tá Kofi Annan fer frá.

Higartil hava fimm boðið sær til at taka við, og av teimum tykist suðurkoreanski uttanríkisráðharrin, Ban Ki-Moon, hava teir frægastu møguleikarnar. Men hann fær ætlandi harða kapping, tí øll hini fýra evnini eru eisini úr Asia.

Trygdarráðið hevur longu havt eina loyniliga atkvøðugreiðslu um aðalskrivarastarvið, og ta ferðina fekk Ban Ki-Moon 14 av teimum 15 atkvøðunum. Tann stóri spurningurin er, hvør tað var, sum ikki atkvøddi fyri honum. USA, Russland, Kina, Bretland og Frakland hava sýtingarrætt, og var tað eitt teirra, sum ikki atkvøddi fyri Ban Ki-Moon, verður hann neyvan aðalskrivari.

Men slíkt kann taka tíð, og soleiðis var eisini, tá Kofi Annan bleiv valdur í 1966. Ikki fyrr enn tann 13. desember samdust tey fimm londini um, at hann skuldi taka við tann 1. januar í 1997.



*Kofi Annan ferfrá á nýggjárinum*

## STUTT SAGT

### Skúlastjóri savnaði barnaporno

Fyrradagin byrjaði eitt rættarmál ímóti einum skúlastjóra í Tróndheimi í Noregi, har ákæruvaldið vil hava mannin dømdan fyri pedofili.

Á tí fyrsta rættarfundinum kom fram, at tann 46 ára gamli maðurin hevði meiri enn 5.000 barnapornografiskar myndir á telduni, og at hann eisini hevði tikið myndir av 11 ára gomlu fosturdóttur síni, meðan hon var nakin. Maðurin, sum hevur mist starvið í skúlanum, viðgekk at hava tikið myndirnar og at hava goymt barnapornografiskar myndir á telduni, men hann helt uppá, at hann er ikki pedofilur.

Undir kanningunum er løgreglan eisini komin eftir, at maðurin hevur neyðtikið tvær kvinnur, sum hann hevur búð saman við fyrr. Kvinnurnar vóru doyvdar við einum ella øðrum evni, og løgreglan fann eisini 58 doyvandi tablettir í íbúðini hjá manninum, skrivar tíðindastovan ANB. Maðurin tók báðar neyðtøkurnar upp á film, og filmarnar fann løgreglan í teldu hansara.

### Fegnast um kvettið

Muslimarnir í Teilandi fegnast um, at herurin hevur rikið Thaksin Shinawatra, forsætisráðharra frá, tí teir vænta, at herurin er betur førur fyri at loysa ósemjuna við teir muslimsku uppreistrarmenninar har suðuri í landinum.

Muslimarnir í Suðurteilandi krevja at fáa sjálvsstýri, men stjórnin hjá Thaksin hevur sett hart ímóti hørðum og hevur sent servandar herdeildir eftir uppreistrarmonnunum. Nú vænta muslimarnir eina broyting, tí herovastin, sum hevur evsta valdið nú, er muslimur. Hann hevur tó ikki givið muslimunum nakað lyfti, men sigur, at Teiland skal hava eina nýggja grundlóg.

Eins og aðrastaðni í Teilandi hevur tað verið friðarligt í teimum muslimsku økjunum, síðani herurin tók valdið fyrr í vikuni. Eygleiðarar siga, at flestu teilendingar tykjast góðtaka kvettið, sjálvt um umheimurin hevur fordømt tað. Eitt nú hevur amerikanska stjórnin sagt, at kvettið kann hava við sær, at amerikanska hjálpin til Teilands verður steðgað. Kvettið er eitt afturstig fyri demokratiið, siga Hvítu Húsini.

### Kom ikki

Ætlanin var, at samráðingarnar um at fáa enda á borgarakrígnum í Uganda skuldu byrja í gjár, men tá tann fyrsti fundurin skuldi setast, var uppreistrarleiðarin, Joseph Kony, ikki at síggja.

Joseph Kony hevur verið leiðari í uppreistrarherinum Harrans Mótstøðuherur. Hesin herurin er kendur fyri sín ómenniskjaliga harðskap, og altjóða krígsbrotsmannadómstólurin ICO hevur kunngjørt, at hann vil hava fatur á Joseph Kony og næstovasta hansara, Vincent Otti. Tað fekk teir báðar at fjala seg, og teir hava boðað frá, at teir koma iki til samráðingarnar, fyrr enn IOC tekur síni boð aftur. Men tað vil dómstólurin ikki.

Borgarakríggið í Uganda hevur vart í 20 ár og hevur verið sera blóðugt. Tann 29. august eydnaðist tað at fáa partarnar at semjast um vápnahvíld. Eftir er at fáa partarnar at semjast um varandi frið, men uttan Joseph Kony eru samráðingarnar nyttuleysar, skrivar AP.